## Tøltfimi úrslit 2013

Fyrsta "Tøltfimis" kappingin fór fram 17. mars í Tølthøllini. Hetta er fyrsta kappingin av sínum slagi í Føroyum. Vit kunnu gleðast um, at vera við at seta á stovn slíkar rossavinarliga kappingar. Hesar kappingar eru við at vinna frama í øllum FEIF londunum, og stendur seg væl í mát við hugburðin hjá FEIF um horsemanship og rossavælferð annars.

8 luttakarar høvdu melda til og 7 teirra byrjaðu kappingina.
Eftir innleiðandi umfarið var støðan hendan:

1. Heri og Vorboði við 5.0
2. Óluvá og Huginn við 4,6
3. Lisa og Trásti við 4.5
4. Gunrid og Fluga við 4.25
5. Knút og Tokkabót við 4, 1
6. Vinjar og Gustur við 3,75
7. Valborg og Jøkull við 3.5 stigum

3 ross fóru víðari í finaluna. Lisa og Trásti tóku seg úr kappingini og sostatt vóru hesi trý í finaluni: Heri og Vorboðið, Óluvá og Huginn og Gunrid og Fluga.

Talan var um eina sera javna og góða kapping. Endaliga úrslitið var hetta:
Nr. 1. Óluvá og Huginn við 5.0
nr. 2. Heri og Vorboði 4,9
Nr. 3. Gunrid og Fluga við 4, 8

Vit takka ríðarunum og áskoðarunum fyri stuðulin og vóna at hendan kapping verður ein afturvendandi kapping á hvørjum árið

**Heilsan. Ítróttarnevndin**


Berg Hestar